

*Jan Højgaard og hansara felag fer ikki úr Samtaki. Tað gjørdi landsfundurin millum jól og nýggjár púra greitt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ikki undirtøka fyri úrmelding

**FAKFELØG** Uppskotið um, at Føroya Fiskimannafelag tekur seg úr Samtaki, fekk ikki undirtøku á landsfundi. Hetta merkir, at fiskimenn framhaldandi vera partur av fakfelagssamstarvinum

Vilmund Jacobsen

Føroya Fiskimannafelag er framvegis partur av Samtaki - eisini eftir landsfundin, sum varð hildin í hølum Føroya Arbeiðarafelags millum jól og nýggjár.

Eitt uppskot var komið um, at felagið tekur seg úr aftur Samtaki, men hetta fall við eitt brak.

Bara ein sókn tók undir við hesum, ein atkvøddi blankt - og allar hinar, sum møttar vóru á landsfundi, vóru fyri, at Føroya Fiskimannafelag heldur fram sum partur av Samtaki.

– Tað besta vápnið, vit fiskimenn hava, er at standa saman um okkara felag – og at standa saman við hinum feløgunum í Samtaki, segði Jan Højgaard, felagsformaður.

Hann legði aftrat, at saman eru feløgini sterk.

– Hesum hava vit sanniliga brúk fyri, nú ágangurin á sjófólk er øgiligur, sum hann tók til.

Hann vísti í síni formansfrágreiðing á, at tað eru summi, sum royna at skapa spjaðing.

– Men jú meiri, vit lata okkum spjaða, tess lættari er hjá okkara mótparti at fáa sítt ígjøgnum, legði Jan Højgaard aftrat.

*vilmund@sosialurin.fo*

---

***- Tað er ógjørligt at siga, hvussu hetta árið kemur at roynast. Hetta veldst um, hvussu upsaveiðan verður, og hvussu gulllaksavertíðin kemur at roynast, sigur Tummas Christophersen***



og eingir batar vóru at hóma, tá lagt varð stilt til jólar.

- Í løtuni er ógjørligt at siga, hvussu hetta árið kemur at roynast. Hetta veldst alt um, hvussu upsaveiðan verður, og hvussu gulllaksavertíðin kemur at roynast.

Tummas Christophersen sigur, at sjálvandi ógróvar gongdin í upsaveiðini teir, sum reka partrolararnar.

- Men, tað er nógv lív í sjónum, og vit meta avgjørt ikki, at upsin er uppfiskaður. Tað er ein góður spurningur, hvar fiskurin er, og hvat er hent við upsanum seinastu tíðina. Í øllum førum er tað ikki, soleiðis sum tað plagar at vera, leggur reiðarin aftrat.

Vestmenningur og Fram loystu aftur til nýggjan túr nýggjársdag.

*vilmund@sosialurin.fo*

## Í heyst hevur verið heilt galið við upsaveiðini, men eg haldi meg tora at siga, at hetta ikki er tí, at upsin er uppfiskaður

TUMMAS CHRISTOPHERSEN

---



## 25 ára starvsdagur

1. januar 2011 hevði John P. Danielsen, Argir arbeitt sum deildarstjóri hjá Elfelagnum SEV í 25 ár

---



*Bæði á Skála (mynd) og í Havn hava arbeiðsmenninir hjá skipasmiðjuni MEST havt úr at gera í seinastuni*

# Nógv skip til umvælingar og viðlíka hald

**HANDVERK** Á skipasmiðjuni MEST í Havn og á Skála hava arbeiðsmenninir seinastu tíðina havt úr at gera

Vilmund Jacobsen

Í Havn hava fleiri skip staðið á bedingini, og onnur hava ligið við bryggju.

Eysturbúgvin, Steintór, Eysturoyingur og Contender hava staðið á bedingini, meðan Enniberg, Helena, Váðasteinur, Reynsatindur, Niels Pauli og Vesturbúgvin hava ligið við bryggju.

Eisini á MEST á Skála hava arbeiðsmenninir havt nógv at gera.

Stóra uppisjóvarskipið Norðborg stendur í dokkini, og annars hevur MEST fingist við Vesturvón og farmaskipið Havtind á Skála.

Heimasíðan www.skipini.com veit at siga, at farmaskipið Fame, sum er skrásett í Noregi, eisini er komið á bedingina á Skála at standa.

*vilmund@sosialurin.fo*